

## Henry svarar fyri seg

Franski landsliðsspælarin, Thierry Henry, skal í dag á fundi við aganevndina hjá FIFA svara fyri seg í sambandi við umstríddu hendingina, tá hann brúkti hondina í seinasta HM-undandystinum ímóti Írlandi. Vanliga revsingin fyri at brúka hondina í slíkari støðu, er fríspark, men so einfalt er tað ikki í hesum førinum, tí eftir »hondbóltin« legði Henry upp til sigursmálið, ið sendi Frakland til HM í Suðurafrika, meðan Írland sat eftir við ongum. Tí verður málið heldur ikki viðgjørt sum vanligt, men eygleiðarar vænta tó ikki, at Henry fær aðra revsing enn eina ávaring og kanska eina bót. Lítið bendir á, at hann fær karantenu, tá HM-endaspælið annars fer í gongd í summar.

# Trý tap í tríggjar dagar

**Tað eydnaðist ikki føroyska manslandsliðnum í hondbólti at vinna sær nakað stig, tá HM-undankapping varð spæld á Kypros**




Jákup Mørk

Meðan stóru londini fyrireika seg til EM-endaspælið í hondbólti, hava smærru tjóðirnar kappast um, hvør skal sleppa við í play-off dystirnar í HM-undankappingini.

Og lat tað bara verða sagt alt fyri eitt, at Føroyar sluppu ikki upp í part millum hesi londini.

Føroyska manslandsliðið var um vikuskiftið á Kypros, har bólkur 1 varð avgreiddur, og við trimum tapum í eins nógvum dystum gjørdist talan ikki um nakra beinleiðis succés.

Sveis vann bólkin klárt, og longu í fyrsta dystinum fingu okkara menn at vita, at sveisiska landsliðið anno 2010 er nakað nógv sterkari enn tað, sum Føroyar fyri 9 árum síðani mundu fingið javnleik ímóti .

At talan var um fyrsta dystin eftir langa ferð, er sum so ikki tann heilt stóra umberingin, men okkara høvdu neyvan sett beinini inn í høllina, áðrenn Sveis streyk avstað. Og so var ikki tað stóra at gera í einum dysti, har endaliga úrslitið gjørdist ein veruligur avsmurningur.




Føroysku landsliðsvenjararnir kundu eftir dystirnar á Kypros staðfesta, at tað kostar nógv, tá føroyska liðið ikki megnar at halda konsentratiónina um uppgávuna í samfullar 60 minuttir
Savnsmynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

### Mistu móti Kypros

Í hinum báðum dystunum gekk nakað betur, hóast úrslitið eisini her gjørdist tap.

Tað var kanska væntandi, at okkara menn skuldu gera okkurt við Kypros, men vertirnir vístu longu í fyrsta dystinum, at teir eisini kunnu bíta frá sær. Og tað gjørdu teir, tá teir vunnu tepran sigur á Hvítarusslandi.

Føroyska avrikið móti Hvítarusslandi leygardagin var tó fyri tað nógva góðkent. Kring steðgin eydnaðist tað mótstøðuni at renna frá okkara monnum, men í aðrar mátar spældi føroyska liðið væl og virðiiga upp til mótstøðuna.

Men júst tað, at liðið í løtum dettur úr dystinum, varð aftur trupulleikin á Kypros-ferðini.

Undan seinasta dystinum søgdu føroysku venjararnir, at her var kanska ein møguleiki at fáa stig, og møguleikin var avgjørt til staðar.

Fyri steðgin hevði føroyska liðið eitt gott tak á Kypros, og støðugt hildu okkara menn seg á odda í dystinum.

Men eftir steðgin gekk ikki eins væl. Konsentratiónin í føroyska spælinum sveik eina løtu, og tað gagnnýtti Kypros til at stinga avstað. Og hóast okkara royndu at stríða seg aftur í dystin, so stóð greitt, at útfallið eftir steðgin kostaði nógv í samlaða úrslitinum.

### Mugu venja meira

Eftir dystin móti Kypros staðfesti annar av venjarunum, Kári Nielsen, í samrøðu við Kringvarpið, at føroysku spælararnir mugu til at venja nógv meira, enn teir hava gjørt, um vit skulu hava nakran møguleika á hesum støðinum.

– Í hesum trimum dystunum vórðu vit mintir á, at vit spæla ein annan hondbólt enn teir gera úti í heimi, staðfesti Kári Nielsen.

Og tað er ein sannroynd, at fysiski parturin so ella so hevur haltað hjá okkara monnum, tá undankappingardystir hava verið á skránni. Sinniliga ber hetta við sær, at liðið ikki er til reiðar at standa á tærnum í 60 minuttir, og teir minuttirnar, sum liðið ikki er á toppinum, verða revsaðir knallhart.

Tað var sjónligt, tá vit í seinastu undankapping vóru um reppið at taka stig frá Italia, og tað varð aftur sligið fast á Kypros, har tað altso ikki eydnaðist at vinna nakað stig.

**Hondbóltur**

**HM-undankappingin, bólkur 1**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Sveis | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 106 | 56 | 50 | 6 |
| 2 | Kypros | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 81 | 93 | -12 | 4 |
| 3 | Hvítarussland | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 92 | 89 | 3 | 2 |
| 4 | Føroyar | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 76 | 117 | -41 | 0 |

## FAKTA

**Føroyar-Sveis 17-44 (7-21)**
**10 min:** 3-10
**20 min:** 5-17
**40 min:** 10-28
**50 min:** 14-37
**Føroyskir málskjúttar:** Hans Áki Dal-Christiansen 6, Tróndur Kragesteen 5 , Heini Hanusarson 2, Carl Herup Olsen 2, Bjarti Hansen 2

**Føroyar-Hvítarussland 32-29 (15-22)**
**10 min:** 6-5
**20 min:** 11-14
**40 min:** 19-26
**50 min:** 26-32
**Føroyskir málskjúttar:** Heini Joensen 10, Finnur Hansson 7, Tróndur Kragesteen 6, Sámal Joensen 4, Poul Kjartan Dam 2, Esbern Patursson 1, Hans Áki Dal-Christiansen 1, Bárður Johannesen 1

**Føroyar-Kypros 27-34 (16-15)**
**10 min:** 6-3
**20 min:** 12-9
**40 min:** 17-20
**50 min:** 22-25
**Føroyskir málskjúttar:** Heini Hanusarson 8, Finnur Hansson 4, Bjarti Hansen 4, Sámal Joensen 4, Tróndur Kragesteen 3, Janus Sørensen 1, Hans Áki Dal-Christiansen 2, Tummas Pauli Hanusarson 1

**Hini úrslitini**

| | |
|---|---|
| Hvítarussland-Kypros | 30-31 |
| Sveis-Kypros | 36-16 |
| Hvítarussland-Sveis | 23-26 |